HOYR
FELAGID FYRI HOYRIBREKAD

Almanna- og mentamálaráðið Tórshavn 8. juni 2023

**Viðvíkjandi uppskot til Løgtingslóg um Brekumboð.**

Vit hava við spenningi sæð fram til, at hetta skuldi gerast veruleiki, og hava vit hesar viðmerkingar til ítøkiliga uppskotið:

**§3. Stk. 2**: Brekumboðið skal, í tann mun tað er viðkomandi og møguligt, hoyra fólk, ið bera brek, og áhugafeløg á brekøkinum.

Hetta eigur at verða sjálvsagt, at Brekumboðið ger tað og ikki bara um tað er viðkomandi og møguligt.

Um vit hyggja eftir grønlendsku skipanini við Handikaptalsmanni, er ein av hansara uppgávum, at samstarva við tey grønlendsku feløgini innan brekøkið. Talan er jú um eitt Brekumboð og ikki ein stovn fyri øll mannarættindi.

**§6, stk. 3:** Her eru tað 3 av limunum í nevndini fyri Brekumboðið, ið kunnu mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi og tað er landsstýrismaðurin, ið kann loysa Brekumboðið úr starvi.

Her meta vit, at tað er alt ov lætt, at sleppa av við eitt Brekumboð, ið ger sínar skyldur, og tí eigur mann at leggja seg tætt at lógini fyri LUM hesum viðvíkjandi.

**§8, Nevndin fyri Brekumboðið.**

Um Landsstýrið ætlar at seta eina nevnd, ið skal ráðgeva Brekumboðnum, hevur samansetingin stóran týdning.

Um vit hyggja eftir, hvussu mann í Danmark hevur skipað Institut for menneskerettigheder, hevur mann har eina breiða nevnd, ið skal millum annað koma við uppskotum, ið minna nógv um tað, ið mann sigur at nevndin fyri Brekumboðið skal. Men har er talan um alt mannarættinda øki.

Í Grønlandi hevur mann Handikaptalsmann, har stendur onki í lógini um eina nevnd. Ì Grønlandi hevur mann " Rådet for menneskerettigheder", ið hevur eina breiða umboðan innan alt mannarættindaøkið. Hetta ráðið minnir meiri um tað vit kenna sum Ráðið fyri brekað, ið hevði eina breiða umboðan.

Vit síggja nógv ivamál, tá hugsað verður um, hvør tað er, ið skal manna eina nevnd, ið skal veita kunning, vegleiðing, ráð og íkast til Brekumboðið.

Vísandi til Paris meginregluna, umtalar hendan mannarættindi í síni breidd, og leggur hendan reglan upp til eina breiða umboðan innan mannarættindaøkið, men París-meginreglurnar staðfesta, at um umboð fyri aðalráð skulu sita í nevndini fyri eftirlitseindina, eiga hesi einans at hava *ráðgevandi* leiklut. Í uppskotinum, ið vit ummæla, hava umboðini úr ráðnum tó møguleika at atkvøða fyri at mæla landsstýrismanninum til at siga Brekumboðið úr starvi. Hetta er eftir okkara meting ikki í samsvari við París-meginreglurnar.

Í uppskotinum um Brekumboð sigur mann, at nevndin skal hava fimm limir, har ein av hesum limum skal umboða áhugafeløg á brekøkinum. Hetta meta vit sum, at brekøkið beinanvegin fær eina rættiliga vánaliga umboðan. Um mann veruliga ætlar at seta eina nevnd, ið skal veita kunning, ráð og íkast, koma við tilmælum o.l. , er mann noyddur at geva brekøkinum eina nógv størri umboðan. Tað ber ikki til, at seta eina nevnd, ið

meir ella minni skal umboða øll mannarættindi, men eigur mann at seta eina nevnd, ið skal umboða brekøkið og sum kennir brekøkið.

**Okkara uppskot er**, at mann hyggur eftir, hvussu samansetingin av Ráðnum fyri brekað var. Har var forfólkið í MEGD føddur limur, og var eitt umboð afturat fyri áhugafeløg í MEGD í ráðnum. Annars vóru umboð fyri kommunur og aðalráð í ráðnum.

Ella, at mann onga nevnd setur, men fær Ráðið fyri Brekað virki aftur, so at tað kann ráðgeva og koma við tilmælum til Brekumboðið.

Velur mann hóast alt, at gjøgnumføra hetta soleiðis sum lagt er upp til, skulu tveir av limunum í nevndini umboða áhugafeløg á brekøkinum og eigur tann, ið til eina og hvørja tíð er forfólk í MEGD, at vera føddur limur í nevndini, fyri at brekøkið skal fáa eina so breiða umboðan sum gjørligt.

Vinarliga vegna Hoyr

Ása Olsen, forkvinna